# Ongar tænastuvinnur verða skrásettar í Føroyum

**Eingin ivi er um, at føroyska KT vinnan er ment ótrúliga nógv seinastu árini. Ferðavinnan hevur tikið seg nógv fram, tað prógva øll ferðafólkini, sum ganga og mala her um summarið. Banka- og tryggingarvinnan hevur havt framgongd. Men felags fyri allar hesar vinnurnar er tó, at eingin veit at siga júst hvussu stór framgongdin er. Tí tað eru eingi hagtøl fyri tænastuvinnurnar í Føroyum**

TÆNASTUVINNAN
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



*KT-vinnan verður fyrsta tænastuvinnan í Føroyum, sum verður hagtalsskrásett*

Hjørdis Gaard arbeiðir á Vinnumálaráðnum, har hon m.a. hevur KT- vinnuna um hendi.

– Um mær tørvar onkur tøl innan KT-vinnuna, má eg gera metingar og t.d. venda mær til hesu ymsu virkini, at biðja um upplýsingar teirra tøl. Ongastaðni eru samlaðu tølini at finna, og tað er sera óheppið, sigur Hjørdis Gaard. Hon sigur at tað eru Fíggjarmálaráðið og Hagstovan, ið eiga ábyrgdina av at skráseta, men innan tænastuvinnuna er einki skrásett, sum er.

– Tað er heilt víst, at hagtølini hava stóran týdning. Serliga tá tað kemur til at eftirmeta KT-vinnupolitikkin. Hagtølini eru góð amboð til at seta sær mál eftir, og somuleiðis til at kanna um málini verða nádd. Eisini hevur tað týdning fyri sjálva vinnuna tá hon setur sær mál, at hagtalsgrundarlag er, so til ber at gera metingar av handliga umhvørvinum, marknaðarkanningar o.s.fr. Men so leingi eingi tøl eru, sum kunnu staðfesta arbeiðið, sum verður gjørt, er torført at fáa størri rótfesti í samfelagnum, sigur hon.

Hjørdis heldur, at um hagtøl vóru, so høvdu føroyska vinnan og tað almenna óiva havt føroysku KT-vinnuna við í útboðnum, á jøvnum føti við útlendskar fyritøkur.

– Tað er torført at siga júst hvussu stórar upphæddir KT vinnan útflytir fyri árliga, tí tað verður sum sagt ikki skrásett nakrastaðni. Einasti útflutningur, sum verður skrásettur eru vørur, sigur hon.

## Vantandi tøl ávirka fíggjarlógina

Fleiri fólk arbeiða innan KT-vinnuna enn á kryvivirkjunum hjá alivinnuni. Hóast tað, fáa alivinnan og kryvjivirkini alstóra umtalu dag og dagliga, meðan nærum einki hoyrist um KT-vinnuna. Øll vita, at alivinnan er á veg út í eina kreppu, men eingin veit, hvussu stóra framgongd KT-vinnan hevur havt. Flestu føroyingar eru samdir um, at ferðavinnan átti at verið ment, men eingin veit akkurát hvussu stór ferðavinnan er í dag.

– Alt verður sjálvandi lættari at fyrihalda seg til, tá tøl eru, sum styðja uppundir útsagnirnar, heldur Hjørdis. Og hon heldur tað ikki vera óhugsandi, at vantandi tølini ávirka politiska kjakið og fíggjarlógina. Hon sigur seg ikki vita um tað kemur fyri í øðrum londum, at tænastuvinnan ikki verður skrásett í útflutningshagtølunum.

– Sum heild, kann eg siga, at onnur lond hava skráseting av vinnunum, óansæð um tær útflyta vørur ella tænastur. Tað er sera óheppið, at vit eru so langt aftanfyri á hesum økinum, heldur hon.

– Tá eingin veit júst hvussu stór inntøkan av útflutninginum hjá tænastuvinnuni er, er torført at vita hvussu høgt hon skal raðfestast. Hvussu nógv skal latast til førleikamenning og gransking av eini vinnu, sum vit ongastaðni síggja inntøkurnar av, heldur Hjørdis.

Men tað er ikki bert á útreiðslusíðuni av fíggjarlógini, at vantandi hagtølini eru ein vansi. Av tí, at einki verður skrásett, er ilt at vita hvussu stórar inntøkur tænastuvinnurnar fáa til vega. Serliga í einum lítlum samfelag, sum avhongur av svikaligu og óstøðugu fiskivinnuni, átti tað at verið alneyðugt at havt allar inntøkur staðfestar og raðfestar.

Føroyska KT vinnan fær væntandi síni hagtøl um ársskiftið, men einki verður sagt um hinar tænastuvinnurnar.



# Ken Hensley til Føroya

**Ein legenda úr rokkheiminum verður við á popfestivali, sum verður í Klaksvík í døgunum 13. til 15. august**

TÍÐINDASKRIV
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*


*Á popfestivali í Klaksvík í august mánaði verður millum onnur kenda rokkstjørnan Ken Hensley at síggja og hoyra*

**Klaksvík:**
Fyrireikararnir til posfestivalin í Klaksvík eru við at fáa øll nøvnini upp á pláss, og í næstum verða tey øll kunngjørd. Greitt er tó, at eitt av nøvnunum er rokklegendan Ken Hensley, mest kendur úr bólkinum Uriah Heep.

Ken Hensley var høvuðsmaður í bólkinum Uriah Heep, sum var eitt tað største rocknavnið í 70-unum, og hann skrivaði teir flestu kendu sangirnar hjá bólkinum - til dømis Stealin, Easy Livin, The Wizard, Lady in Black og aðrar.

Hensley hevur ongantíð verið í Føroyum, hóast Uriah Heep tvær ferðir hevur spælt her. Tá var hann langt síðani farin burtur úr bólkinum og arbeiddi saman við øðrum um sín tónleik. Ken Hensley hevur sjálvur ein bólk, og hann hevur spælt nógv seinastu tíðina - millum annað í Norðurlondum, Russlandi og Bretlandi.

Leygardagin 14. august verður Ken Hensley so at hoyra fyri fyrstu ferð nakrantíð í Klaksvík. Tað verður á stóru útikonsertini, sum verður í Vágsbøi mitt í Klaksvík, og hann ætlar sær at tríva í nógvar av teimum kendu sangunum, sum hann skrivaði til Uriah Heep.

Tað verður eitt fantastiskt upplivilsi at fáa hesa livandi legenduna innan rocktónleikin á vitjan her í Føroyum.

Eitt annað navn, sum er greitt, er kendi bólkurin Bonny M.

Tiltøkini í sambandi við popfestivalin verða í KÍ høllini eisini, og so verður útikonsertin á Vágsbøi seinni leygarkvøldið.

# Headache Blues Treo í Atlantis



TÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Leygarkvøldið klokkan 21:00 verður ein áhugaverd konsert í Atlantis, talan er um konsert við tveimum bólkum. Headache Blues Treo og Nicolina Rubeksen Band.

Headache Blues Treo er bólkur úr Havn, mannaður av Edvard Nyholm Debes, Una R Debess og Rógva á Rógvu. Bólkurin sum er fløguaktuellur spælir Blues tónleik. Bólkurin var fyrstuferð at hoyra til seinasta Prix Føroyar, og hevur síðan tá javnan verið á palli, og nú kemur fyrsta fløgan hjá bólkinum, og hesa fløgu verður møguleiki at ogna sær eitt eintak av, í Atlantis nú leygarkvøldið.

Nicolina Rubeksen Band er nyggjur bólkur úr Klaksvík, mannaður av Nicolinu, Jógvan Fróðin Baldvinsson, Dánjal Kjærbo, Leif Egholm og Jens Paula Joensen. Tónleikurin bólkurin spælur er útlendskur popptónleikur.

Atgongumerkir til konsertina fáast í húsinum ein tíma frammanundan.

# Jóhanna varð ritstjóri

Føroyskt Lógar Rit valdi á aðalfundi mánakvøldið tann 24. mai nýggja ritstjórn. Nýggjur ritsjóri er 32 ára gamla Jóhanna Arge, løgfrøðingur, sum til dagligt starvast í Innlendismálaráðnum.

– Ætlanin er at halda áfram við tí, sum hevur verið gjørt. Miðað verður eftir at útgeva tilfar, sum fyrst og fremst er viðkomandi fyri føroyska løgfrøði, og í komandi riti verða greinar um millum annað fyrisitingarrætt og um heimildirnar, sum tingið letur landsstýrisfólkum at gera kunngerðir, sigur Jóhanna Arge, nýggjur ritstjóri á Føroyskum Lógar Riti.

Hon leggur afturat, at málbólkurin hjá tíðarritinum fyrst og fremst er løgfrøðingar og stjórnmálafrøðingar, og at tað er eitt akademiskt tíðarrit. Í fjør vórðu 230 síður givnar út.

Í ritstjórnina skulu umframt ritstjóra veljast fýra lógar- ella stjórnarkøn.

Í ritstjórnini sita nú Bárður Larsen, Birita S. Samuelsen, Bogi Eliasen, Sigmundur Ísfeld, Rúni Rasmussen, og Jóhanna Arge.

Bárður Larsen, Jóhanna Arge og Sigmundur Ísfeld stillaðu uppaftur, meðan Birta Biskopstø og Kári á Rógvi ikki ynsktu at taka við afturvali.

Endamálið við Føroyskum Lógar Riti er at vera eitt óheft løgfrøðiligt tíðarrit, ið fyrst og fremst útgevur tilfar, sum er viðkomandi fyri føroyska løgfrøði. Ætlanin er eins og undarfarnu trý árini at geva trý rit út í 2004, og væntandi verða kjakfundir eisini á skránni.

Jóhanna Arge sigur, at nógv tilfar verður at síggja um grundlógarálitið, sum varð kunngjørt á flaggdegnum. Hon sigur eisini, at tikin verður upp ein nýggjur táttur, har tingfólk fara at seta fram sjónarmið um eitthvørt, ið hevur við løggávuarbeiði teirra at gera. Hesin tátturin skal eita "Tankar av tingi."

**hkm**

# Frágreiðing frá Amnesty

AMNESTY
*tíðindaskriv*

Ársfrágreiðingin hjá Amnesty International fyri 2004 er almannakunngjørd.

Frágreiðingin, sum er 339 blaðsíður, lýsir mannarættindastøðuna kring heimin í 2003, frágreiðingar eru um mál úr 155 londum.

Irene Khan, aðalskrivari, legði frágreiðingina fram á tíðindafundi í London mikumorgunin 26. mai. Hon legði serliga dent á, at í hesum ótryggu tíðum, eigur heimurin ikki einans at berjast móti heimsumfatandi hóttanum, men eisini at berjast fyri heimsumfatandi rættvísi. Irene Khan vísti á nógv brot sum hendu í 2003, men tók eisini fram sigrar, sum hava verið í farna árinum, t.d. nevndi hon Aminu Lawal í Nigeria, hvørs deyðadómur varð settur til viks, orsakað av dygga stuðlinum, hennara mál fekk.

## Rættvísi fyri øll

Amnesty International hevur á altjóða aðalfundi í Meksiko í august samtykt eina nýggja stategiska ætlan við sjey høvuðsevnum, sum felagsskapurin fer at leggja áherðslu á komandi 6 árini. Við yvirskriftini Rættvísi fyri øll er ætlanin at arbeiða enn meira miðvíst við at verja mannarættindini kring allan heimin. Ætlanin er lýst í frágreiðingini.

## Deyðarevsing

Í 2003 vóru í minsta lagi 1.146 fólk avrættaði í 28 londum. Í minsta lagi 2.756 vóru dømd til deyðis í 63 londum. Hesi tøl fevna bara um tey mál, sum Amnesty International hevur kunnleika til. Veruligu tølini eru heilt víst hægri.

Eins og undanfarin ár var størsti parturin av avrættingunum framdur í nøkrum fáum londum. Í 2003 vóru 84 % av kendu avrættingunum í Kina, Iran, USA og Vietnam.